# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit eru sannførd um, at Madeleine doyði av einum óhappi, tá mamman slóð ella skumpaði hana*

*(portugisiska løgreglan)*

# Halda seg vita hvussu Madeleine doyði



*Kate og Gerry McCann á veg úr flogfarinum úr Portugal í gjár*



*Løgreglan á varðhaldi uttan fyri húsini hjá Kate og Gerry McCann í bygdini Rothley norðan fyri London*

**Foreldrini hjá Madeleine McCann komu aftur til Bretlands í gjár, men sambært fjølmiðlunum skulu tey til avhoyringar aftur longu í morgin. Løgreglan gerst alt meiri sannførd um, hvussu Madeleine doyði**

Kate og Gerry McCann hava verið í Portugal tað mesta av tíðini, síðani dótturin Madeleine hvarv fyri fýra mánaðum síðani, og tey eru heldur ikki sloppin treytaleyst aftur til Bretlands nú. Portugisiska løgreglan hevur nevnliga treytað sær, at tey bæði koma aftur til Portugals, um løgreglan har vil tosa við tey.

Portugisiska blaðið Diario de Notícias skrivar í dag, at nakrar kanningar, sum rannsóknarstovnurin Forensic Science Service í Birmingham hevur gjørt, verða ætlandi lidnar í hesari vikuni, og sambært blaðnum vóna myndugleikarnir, at kanningarúrslitið fer at geva løgregluni grundarlag fyri at handtaka McCann-hjúnini.

Løgreglan hevur skrivað eina frágreiðing um tað, sum kom burturúr, tá løgreglumenn avhoyrdu Kate og Gerry McCann í síðstu viku. Tann frágreiðingin er latin ákæruvaldinum í Portugal í dag, men sum skilst er løgreglan ikki nøgd við tað, sum McCann-hjúnini søgdu undir avhoyringini. Tá ákæruvaldið hevur kannað frágreiðingina og mett um innihaldið, verður frágreiðingin latin einum dómara í býnum Portimao. Síðani skulu Kate og Gerry McCann avhoyrast eina ferð afturat, og gevur dómarin ákæruvaldinum viðhald, verða hjúnini varðhaldsfongslað, skrivar Diario de Notícias.

## Óhapp

Portugisiska løgreglan er av teirri uppfatan, at Madeleine McCann doyði av einum óhappi. Diario de Notícias skrivar frá tí, sum blaðið kallar vælvitandi keldur í løgregluni, at tað er nógv, sum bendir á, at Kate slóð ella koyrdi undir Madeleine, sum datt og fekk so stóran skaða í høvdið, at hon doyði av stoytinum. Løgreglan sigur seg hava funnið teknisk prógv í einum bili, sum foreldrini leigaðu seinni, og løgreglan heldur tí, at tey beindu líkið av Madeleine burtur við hesum bilinum.

- Okkara sannføring gerst tryggari fyri hvønn dag, sum fer, og nú leggja vit okkum eftir at finna líkið, sigur løgregluovastin í Faros-landspartinum, Guilhermino Encarnacao, við Diario de Notícias.

## Hørð neyðlending í Aalborg

Tey 73 ferðafólkini umborð á SAS-flogfarinum úr Keypmannahavn til Aalborg seinnapartin í gjár fingu ein hvøkk, tá flogfarið noyddist at neyðlenda á flogvøllinum í Aalborg. Hjólið fór undan øðrum vonginum, so flogfarið fór akandi eftir liðini eftir lendingarbreytini og endaði uttan fyri sjálva breytina. 11 fólk vórðu flutt á sjúkrahús, men eingin fekk stórvegis skaða. Skaðanevndin kannar nú tilburðin.

## STUTT SAGT

### Shinzu váðar sessin

Japanski forsætisráðharrin, Shinzo Abe, er til reiðar at leggja frá sær, um tjóðartingið fellir eitt uppskot um at leingja eina serlóg, sum heimilar japonskum skipum at taka lut í amerikonskum herflotavenjingum í Indiska Havinum. Serlógin, sum kom í gildi í 2001, heimilar skipum hjá herflotanum at lata amerikonskum herskipum olju undir venjingum, sjálvt um japanska grundlógin sigur, at japanskt hervald skal ikki út um landsins egna mark. Stjórnarflokkurin hjá Shinzu Abe misti meirilutan í tinginum fyri stuttum, og tí er ikki vist, at meiriluti er fyri at leingja serlógina. Men Shinzu Abe vil ikki taka uppskotið aftur, sigur hann.

### Sharif heimaftur

Fyrrverandi pakistanski forsætisráðharrin Nawaz Sharif kom í morgun við flogfari til Islamabad. Sharif varð koyrdur frá í 1999, og nú er hann komin heim aftur at bjóða Pervez Musharaf, forseta av. Tað var Musharaf, sum koyrdi Sharif frá fyri átta árum síðani. Eygleiðarar í Pakistan halda ikki, at Musharaf er serliga fegin um, at Sharif er komin aftur, og í gjár frættist, at løgreglan hevði handtikið fleiri av næstu stuðlunum hjá fyrrverandi forsætisráðharranum.

### Nazistar í Ísrael

Ísraelska løgreglan hevur avdúkað ein nýnazistiskan felagsskap, sum innflytarar úr fyrrverandi Sovjetsamveldinum høvdu stovnað. Átta limir í felagsskapinum eru tiknir. Sambært myndugleikunum hava nýnazistarnir framt fleiri álop á trúgvandi jøðar, samkynd og útlendingar, og teir hava eisini málað nazistatekin á fleiri synagogur. Ísraelsku myndugleikarnir siga seg hava varhugan av, at felagsskapurin hevur havt samband við nýnazistar í Týsklandi.